# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 16. september 2009


# Magnus norðurlendskur forseti

**Formaðurin í Flogbóltssambandinum var á aðalfundi um dagarnar afturvaldur sum forseti fyri norðurlendska flogbóltssamstarvið, NEVZA, har hann vann valið í kapping við formannin í danska flogbóltssambandinum**




einslistin@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen


Í farnu viku vóru umboð fyri Flogbóltssambandið, Magnus Tausen og Niclas Joensen, á aðalfundi í europeisku flogbóltssamgonguni, CEV. Aðalfundurin var í Izmir í Turkalandi, har samstundis var dystast um europameistaraheitið í mansflogbólti.

Men tað, sum kanska var enn meira merkisvert, sæð úr føroyskum sjónarhorni, var afturvalið av Magnusi Tausen sum forseta í norðurlendska flogbóltssamstarvinum, NEVZA. Felagsskapurin hjá norðurlendsku flogbóltssambondunum hevði aðalfund dagin fyri CEV-aðalfundin, og talan gjørdist um eina stóra álitisváttan til føroyska formannin.

Síðstu tvey árini hevur Magnus verið NEVZA-forseti, og hóast Danmark á aðalfundinum stillaði sín formann, Erik Jacobsen, upp ímóti Magnusi, so tók tann føroyski við afturvali og vísti seg eisini at draga longra stráið við sannførandi 6-1 sigri í atkvøðugreiðsluni.

– Tað er sjálvsagt hugaligt at síggja, at hini norðurlondini virðismeta føroyska innsatsin í bæði europeiskum og altjóða flogbólti, so vit fegnast um afturvalið, sigur Magnus Tausen, sum í komandi tvey ára valskeiðnum kann síggja fram til, at talan verður um ein bæði størri og sterkari felagsskap.





**Magnus Tausen heldur fram sum forseti í norðurlendska flogbóltssamstarvinum, NEVZA, komandi tvey árini**

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistin

## Víðka felagsskapin

Øll norðurlond eru limir í NEVZA, men á aðalfundinum hesa ferð fekk Ongland váttan fyri, at landið eisini sleppur upp í part, umframt at ein umsókn væntandi kemur frá Skotlandi í næstum. Tá hesi bæði eru við, kann tað vera so skjótt, at eisini Wales, Írland og helst eisini Norðurírland velja somu leið.

– Vit síggja fram til at víðka felagsskapin, tí við einum sterkum norðurlendskum samstarvi, ið eisini fevnir um flogbóltssambondini í Bretlandi, eru vit brádliga ein størri og týðandi samstarvspartur í europeiskum høpi, sigur Magnus Tausen.

– Umframt, at vit her fáa ein felagsskap, ið kann gera seg galdandi, tá stóru avgerðirnar skulu takast, eru vit eisini við í felagsskapinum fyri smátjóðir, ið eru rættiliga nógvar í tali. So hóast Føroyar kunnu tykjast smáar, hava vit góðar møguleikar fyri at fáa okkara ávirkan, har tær veruliga stóru avgerðirnar í flogbólti verða tiknar.

## Politiska ávirkan

Magnus Tausen sigur, at bæði í europeisku flogbóltssamgonguni, CEV, og altjóða flogbóltssamgonguni, FIVB, hevur verið ein ávís mótstøða ímóti, at norðurlond standa ov sterk, men í øllum førum í europeiskum høpi er hetta rák nú við at venda.

– Tað er eingin loyna, at norðurlond eru øgiliga væl skipað, so í staðin fyri at óttast ta dygdina, eru fleiri nú sinnað at njóta gott av henni. Og tað kann so aftur koma okkara norðurlendska felagsskapi til góðar, sigur hann.

– Okkara felagsskapur byggir fyrst og fremst á nógv virksemi, ið fevnir um kappingar og líknandi, men so hvørt sum vit fáa styrkt NEVZA, fáa vit enn betri møguleikar at gera okkum galdandi, tá talan er um flogbóltspolitisk mál, ið bæði viðvíkja okkum og flogbóltinum sum heild. Tað er eisini við til at gera forsetatassessin til eina spennandi avbjóðing komandi tvey árini.

## Poland vann EM í mansflogbólti

Føroysku flogbóltsleiðararnir, Magnus Tausen og Niclas Joensen, vóru vitni til eitt spennandi EM-endaspæl í mansflogbólti, tá teir í farnu viku vóru á altjóða og norðurlendskum aðalfundum í Izmir í Turkalandi.

Samstundis sum hesir aðalfundir vóru á skránni, var eisini EM-endapælið avgreitt, og har gjørdist tað heldur óvæntað Poland, ið gjørdist europameistari. Poland vann í finaluni 3-1 á Fraklandi, við settúrslitunum 29-27, 25-21, 16-25 og 26-24.

Men tað mest óvæntaða var ikki júst finaluúrslitið, men heldur tað, at hvørki Russland ella Bulgaria megnaðu at spæla seg í finaluna. Tey bæði londini vóru stórfavorittar eftir bæði innleiðandi bólkarnar og millumspælið, men møttu síðani í hálvfinalunum harðari mótstøðu.

Serliga Poland gjørdi positivt vart við seg við at vinna sannførandi á Bulgaria, meðan Frakland ikki fekk bilbukt við Russlandi, fyrr enn fimm sett vóru spæld. Serliga hjá russum var talan um stórt vónbrot, tí hóast gott spæl og fleiri finalupláss seinnu árini, er tað ikki eydnast Russlandi at vinna nakra av stóru kappingunum.

Av norðurlondum var tað bara Finnland, ið kom við til EM-endaspælið og endaði á 12. plássi av teimum tilsamans 16 londunum.

**hil**